Bárður á Steig Nielsen
Helgi Abrahamsen
Magnus Rasmussen
Erhard Joensen
Johan Dahl
Eyðdis Hartmann Niclasen
Kaj Leo Holm Johannesen
vegna Sambandsflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu
(Broytingar í tøkugjaldinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 4*. Við átekning í fíggjarlógini til inntøkujáttanina í fíggjarárinum verður ásett, hvør framleiðslukostnaður fyri kilo verður nýttur. Fyri fíggjarárið 2023 verður framleiðslukostnaður á 39,15 kr. fyri kilo nýttur."
Stk. 4-8 verða eftir hetta stk. 5-9.

2. § 2, stk. 4, sum verður stk. 5, verður orðað soleiðis:
"Gjaldið verður ásett soleiðis:
1) Er miðal altjóða marknaðarprísurin lægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 0,5%.
2) Er miðal altjóða marknaðarprísurin tann sami sum ella upp til 5 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 2,5%.
3) Er miðal altjóða marknaðarprísurin millum 5 kr. og 15 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 5%.
4) Er miðal altjóða marknaðarprísurin millum 15 kr. og 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 7,5%.
5) Er miðal altjóða marknaðarprísurin meir enn 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 10%."

3. Í § 2, stk. 7, sum verður stk. 8, verður "1. oktober" broytt til: "1. november".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2023.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Viðmerkast kann, at hetta lógaruppskotið tekur støði í einum áður framløgdum lógaruppskoti frá undanfarna landsstýri, løgtingsmál nr. 19/2022. Tað uppskotið datt burtur vegna løgtingsvalið í desember 2022. Sambandsflokkurin hevur í hesum uppskotinum lagt dent á at tillaga, leggja afturat og broyta almennu viðmerkingarnar og eisini rættað til tekstin um avleiðingarnar av uppskotinum og serligar viðmerkingar, umframt at broyta gildiskomuna í sjálvum lógartekstinum.

Orsakirnar til at leggja fram hetta lógaruppskotið eru tvinnar. Fyri tað fyrsta hevur prísstøðið á altjóða marknaðinum fyri sølu av laksi verið støðugt hækkandi, síðan lógin um loyvisgjald upprunaliga varð sett í gildi. Tí metir Sambandsflokkurin, at tað er rímiligt, at alivinnan skal gjalda eitt lutfalsliga hægri gjald, tá prísurin á altjóða marknaðinum er óvanliga høgur. Fyri tað næsta er framleiðslukostnaðurin, sum er grundarlagið undir útrokningini av tøkugjaldinum í alivinnuni, munandi hækkaður seinnu árini. Tað er týdningarmikið, at framleiðslukostnaðurin leypandi verður lagaður til veruliga kostnaðin. Um framleiðslukostnaðurin ikki verður tillagaður, kunnu íkoma støður, har alifyritøkur fara at rinda skeivt tøkugjald, sæð í mun til veruliga framleiðslukostnaðin.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lógin á økinum er løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

Stutt um lógina

Grundarlagið fyri útrokningini av tøkugjaldinum er altjóða ásetti marknaðarprísurin, sum er skrásettur á "Fish Pool Index", FPI (einasti altjóða skrásetti laksaprísur). Útrokningargrundarlagið er mánaðarliga tøkan av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði. Gjaldið verður ásett sum ávíst prosent av avgjaldsgrundarlagnum.

Við átekning í løgtingsfíggjarlógini fyri fíggjarárið 2022 er ásett, at mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært "Fish Pool Index" verður brúktur sum altjóða marknaðarprísur til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum undir loyvisgjaldinum.

Umroknað verður til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

Loyvisgjaldið á alivinnuna er ikki at meta sum ein skattur, men heldur sum eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikarnir áleggja fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini.

Meginreglan í tøkugjaldsskipanini er, at jú hægri alifiskaprísurin er, tess hægri er gjaldið:

- Er prísurin 36 kr. kilo ella hægri, er gjaldið 5%.
- Er prísurin millum 32 kr. og 36 kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
- Er prísurin lægri enn 32 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Alifyritøkur kunnu draga loyvisgjaldið frá skattskyldugu inntøkuni á sama hátt, sum tær kunnu draga frá aðrar rakstrarútreiðslur, sum hava beinleiðis samband við virksemið hjá fyritøkuni. Rakstarútreiðslur eru sambært § 31 í skattalógini ".... útreiðslur, sum í árinum ganga til at vinna inntøkur, tryggja tær og halda teimum við ..."

1.3. Endamálið við uppskotinum

Høvuðsendamálið við lógaruppskotinum er at tillaga lógina um loyvisgjald, soleiðis at alifyritøkurnar skulu gjalda lutfalsliga meira, tá laksaprísurin er høgur. Eisini er endamálið, at framleiðslukostnaðurin verður ásettur einaferð um árið fyri at tryggja, at útrokningin av avgjaldsgrundarlagnum er røtt, og tekur støði í endaligu ársroknskapartølunum hjá alivinnuni.

Frameftir verður minstagjaldið á 0,5% einans goldið, tá miðal altjóða marknaðarprísurin er lægri enn framleiðslukostnaðurin. Er prísurin hægri enn framleiðslukostnaðurin, byrjar skipanin við stigvísum hækkingum.

Framleiðslukostnaðurin at nýta fyri 2023, sum byggir á ársroknskapartøl frá 2021, er útroknaður til at vera 39,15 kr. fyri kilo.

Fyri alivinnu og fyri umsitingina av skipanini, er eitt nýtslugjald/ tøkugjald, sum er grundað á ein kendan framleiðslukostað og ein kendan søluprís, ein einføld og gjøgnumskygd skipan at umsita.

Í einum áðurlagda lógaruppskoti frá undanfarna landsstýri, løgtingsmál nr. 19/2022 varð greitt frá í viðmerkingunum, at eftir áheitan frá TAKS varð eisini skotið upp at gera eina tekniska broyting í § 2, stk. 7. Í § 2, stk. 7 í løgtingslógini um loyvisgjald á alivinnu er ásett, at tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Skotið varð tá upp, at fjórða árliga gjaldið skal fella til gjaldingar 1. november heldur enn 1. oktober. Uppskotsstillararnir hava eisini tikið hesa broyting við í fyriliggjandi uppskoti.

Longu tá lógin varð samtykt á fyrsta sinni, var ætlanin, at gjaldingin av tøkugjaldinum skuldi gerast pr. ársfjórðing eins og við meirvirðisgjaldinum, t.e. at fjórða gjaldið skuldi falla til gjaldingar 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. TAKS og alivinnan virka longu, sum var lógin broytt, og tískil hevur henda tekniska broytingin hvørki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri partarnar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógarbroytingin ger, at alifyritøkur skulu gjalda lutfalsliga hægri tøkugjald, tá laksaprísurin er høgur, og samstundis gjalda minni, tá prísurin er lágur. Harumframt verður framleiðslukostnaðurin fastlagdur árliga - forskotin við tveimum árum.

Avgjaldsgrundarlagið er tann nøgdin, alifelagið hevur slaktað ein ávísan mánað, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Tøkugjaldið verður funnið við at avgjaldsgrundarlagið verður faldað við viðkomandi prosentsatsi, ið er stigvíst hækkandi, alt eftir hvør miðal altjóða marknaðarprísurin er.

Eftir nýggju ásetingunum í lógini, verða gjøldini frameftir hesi:

- Er prísurin lægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 0,5%
- Er prísurin hin sami sum ella 5 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 2,5%
- Er prísurin millum 5 og 15 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 5,0%
- Er prísurin millum 15 og 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 7,5%
- Er prísurin meir enn 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 10%

Sjá annars yvirlitið í fylgiskjali 1: Útrokningar av tøkugjaldi o.a., sum m.a. vísir samanhang millum eina samlaða framleiðslu upp á 90 tús. tons og ein framleiðslukostnað upp á 39,15 kr. pr. kg.

Endamálið við stigvísa gjaldinum í mun til altjóða marknaðarprísin er, at stigini verða ásett við støði í meting av framleiðslukostnaðinum hjá alifyritøkunum, t.e. at tá marknaðarprísurin á laksi nærkast metta framleiðslukostnaðinum, so lækkar prosentvísa gjaldið.

Hildið verður fast í grundregluni um at krevja eitt nýtslugjald fyri framíhjárættindi at gagnnýta føroysku aliøkini. Nýtslugjald verður kravt, uttan mun til, hvussu laksaprísurin háttar sær. Er laksaprísurin lægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 0,5%.

Mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært “Fish Pool Index” verður framvegis brúktur sum altjóða marknaðarprísur at rokna avgjaldsgrundarlagið undir loyvisgjaldinum. Umroknað verður framvegis til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Hetta uppskotið hevur ikki verið til hoyringar ella ummælis hjá áhugabólkum í alivinnuni.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Talva 1: Tøkugjald fyri árini 2018-2022

Tøkugjald	2018	2019	2020	2021	2022M
Verandi skipan	136.400.000	140.000.000	85.700.000	196.000.000	267.798.125

Í talvu 1 eitt sæst, hvussu nógv landið hevur fingið inn í tøkugjaldi árini 2018-2022 eftir verandi skipan. Í 2021 vóru prísirnir lutfalsliga lágir, men hóast hetta fekk landið 196 mió. kr. inn í tøkugjaldi. Hevði nýggja skipanin verið galdandi í 2021, hevði landið fingið umleið 60-65 mió. kr. minni inn í tøkugjaldi. Orsøkin til hetta er, at framleiðslukostnaðurin er hækkaður munandi, síðani tøkugjaldið seinast í 2018 varð stillað, og at marknaðarprísurin í fleiri vikur í 2021 lá undir framleiðslukostnað. Fyri hesi tíðarskeið rindaði alivinnan sostatt eitt tøkugjald, hóast raksturin gav undirskot. Hinvegin, um broytti stigin var galdandi í 2022, har laksaprísirnir hava verið sera høgir, so hevði landskassin fingið umleið 160 mió.kr. eyka inn í tøkugjaldi í 2022.

Talva 2: Mett tøkugjøld fyri árini 2023-2024

Tøkugjald	2022M	2023M	2024M
Verandi skipan	267.798.125	255.789.514	240.799.795
Nýggja skipanin	428.137.881	330.490.384	268.117.555
Munur	160.339.756	74.700.870	27.317.760

Talva 2 vísir m.a. mettar árligar inntøkur frá tøkugjaldinum fyri tíðarskeiðið 2022-2024. Fyri at kunna gera árligar samanberingar, verður ikki tikið hædd fyri, at lógin kemur í gildi 2023.

Sum sagt, so tryggjar nýggja skipanin, at alifyritøkur skulu gjalda lutfalsliga hægri tøkugjald, tá laksaprísurin er høgur, og samstundis gjalda minni, tá prísurin er lágur. Í talvu 2 sæst, hvussu nógv landið væntar í meirinntøku av nýggju skipanini árini 2023 og 2024. Metingin omanfyri tekur støði í forward prísinum á Fish Pool fyri 2022, 2023 og 2024. Samlaða tøkan í tonsum í 2022 er mett at vera 10% lægri enn í 2021, meðan tøkan í 2023 og 2024 verður mett at hækka 5% hvørt árið.

Avleiðing fyri tøkugjaldið

Eftir verandi skipan hevði landið fingið 255,8 mió. kr. í tøkugjaldi í 2023. Eftir nýggju skipanini fær landið 292,8 mió. kr. í tøkugjaldi í 2023. Metingin er sostatt, at landskassin fær 37 mió. kr. í øktari inntøku sum avleiðing av lógaruppskotinum, grundað á, at lógaruppskotið kemur í gildi 1. juli 2023.

Avleiðing fyri partafelagsskattin

Tøkugjaldið er at meta sum ein rakstrarkostnaður hjá alifyritøkunum, og skal tí dragast frá í skattskyldugu inntøkuni sambært skattalógini. Økta tøkugjaldið ger, at úrslitini hjá alifyritøkunum minka og harvið rinda hesi minni í partafelagsskatti. Partafelagsskatturin er í løtuni 18%.

Kommunurnar fáa 30% av partafelagsskattinum og landið fær 70%, so hetta ávirkar eisini kommunurnar. Taka vit t.d. árið 2023 frá 1. juli, har metta meirinntøkan, sum avleiðing av

nýggju skipanini, er 37 mió. kr., so minkar partafelagsskatturin við umleið 6,6 mió. kr. Netto eru sostatt umleið 30,4 mió. kr. eftir til almennu kassarnar. Partafelagsskatturin verður tó inngoldin árið eftir, at ársúrslitið fyriliggur, í hesum førinum í 2024.

Avleiðing fyri skatt á vinningsbýti
Eitt økt tøkugjald merkir, alt annað líka, at minni verður at luta út til partaeigararnar, og tí minkar skatturin av vinningsbýti eisini. Í miðal fær landið 7,4% av rakstrarúrslitinum inn í vinningsbýtisskatti. Hetta merkir, at um vit økja rakstrarkostnaðin hjá alivinnuni við einum øktum tøkugjaldi, so missa vit 7,4% av hesi øktu inntøkuni sum ein lækkaðan vinningsbýtisskatt. Hetta svarar til á leið 5,4 mió. kr. árliga.

Samlaða avleiðingin fyri almennu kassarnar
Um vit rokna við at fáa 27,3 mió. kr. eyka í tøkugjaldi næsta ár, 2024, so missa vit 4,9 mió. kr. í partafelagsskatti og 2 mió. kr. í vinningsbýtisskatti. Økta nettoinntøkan til almennu kassarnar verður sostatt 20,4 mió. kr.

Tað hevur týdning, at tær fíggjarligu avleiðingarnar, sum eitt hægri tøkugjøld hevur á kommunukassarnar og harvið lægri inntøkur frá partafelagskatti, verða kompenseraðar og peningur fluttur frá landinum til tær kommunur, sum hava inntøkur frá alifyritøkum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Føroysku alifyritøkurnar verða ávirkaðar av uppskotinum. Fyri alivinnuna hevur uppskotið við sær, at tøkugjaldið í 2023 væntandi økist við umleið 37 mió. kr. - grundað á, at lógin fær gildi 1. juli 2023. Hetta merkir, at rakstrarkostnaðurin hjá føroysku alifyritøkunum hækkar umleið 37 mió. kr. Økti rakstrarkostnaðurin merkir, at alifyritøkurnar, alt annað líka, rinda lutfalsliga minni í partafelagsskatti og rinda lutfalsliga minni út í vinningsbýti.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri nøkur øki í landinum. Tær kommunur, sum í dag fáa partafelagsskatt, sum stavar frá alifyritøkunum, fara at fáa eitt provenutap.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið sampakkar við millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, panting og sektir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindini hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Tað eru ikki ásetingar um skattir og avgjøld í uppskotinum, sbr. pkt. 2.12 niðanfyri.

2.12. Gjøld
Loyvisgjaldið á alivinnuna er ikki at meta sum ein skattur, men heldur sum eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikarnir áleggja fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Avgjaldsgrundarlagið verður framvegis roknað sum tann nøgdin, alifelagið hevur slaktað í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Hetta er eins og í galdandi lóg. Mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index verður framvegis brúktur sum altjóða marknaðarprísur at rokna avgjaldsgrundarlagið undir loyvisgjaldinum. Hetta er sama skipan, sum eftir galdandi lóg.

Framleiðslukostnaðurin fyri kilo verður útroknaður árliga. Hetta verður gjørt við støði í almennu roknskapunum hjá alifyritøkunum. Tað eru ársroknskapirnir í undanfarna ári, sum verða nýttir í hesum høpi. Sostatt eru tað roknskapirnir fyri 2021, ið verða nýttir, tá framleiðslukostnaðurin skal ásetast fyri 2023. Framleiðslukostnaðurin fyri 2023, sum byggir á roknskapartøl frá 2021, er roknaður til at vera 39,15 kr. fyri kilo.

Hátturin, ið verður nýttur til at finna framleiðslukostnaðin, er hesin:

Framleiðslukostnaður =
+Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar
+Goymslubroytingar
+Aðrir uttanhýsis kostnaðir
+Starvsfólkakostnaðir
+Av- og niðurskrivingarkostnaðir
÷Tøkugjaldið til landskassan.

Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar: Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru sum oftast uppgivnir í rakstrarroknskapinum sum ein serstakur postur. Tó upplýsa summar fyritøkur einans aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, har kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru innroknaðir. Í slíkum føri eru tað einans aðrir uttanhýsis kostnaðir, sum verða nýttir í útrokningini. Tað er rakstarroknskapurin í ársfrásøgnini, sum skal nýtast í útrokningini.

Goymslubroytingar: Her er talan um goymslubroytingar av liðugvørum og vørum í gerð. Virðið á goymslubroytingunum er tað í rakstrarroknskapinum uppgivna virðið. Tað er rakstrarroknskapurin í ársfrásøgnini, sum skal nýtast í útrokningini.

Aðrir uttanhýsis kostnaðir: Aðrir uttanhýsis kostnaðir eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum. Summar fyritøkur uppgeva aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, sum eisini umfatar kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Aðrar fyritøkur skilja ímillum aðrar uttanhýsis kostnaðir og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Fyri útrokningina er tað umráðandi, at bæði aðrir uttanhýsis kostnaðir og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar verða tiknir við. Tað er rakstrarroknskapurin í ársfrásøgnini, sum skal nýtast í útrokningini.

Starvsfólkakostnaðir: Starvsfólkakostnaðir eru teir, ið eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum. Tað er rakstrarroknskapurin í ársfrásøgnini, sum skal nýtast í útrokningini.

Av- og niðurskrivingar: Tað eru av- og niðurskrivingarnar í rakstrarroknskapinum, sum skulu nýtast. Í hesum sambandi er tað rakstrarroknskapurin í ársfrásøgnini, sum skal nýtast til útrokningina.

Tøkugjaldið til landskassan: Hjá alifyritøkunum er tøkugjaldið ein kostnaður, sum verður skrásettur í rakstrarroknskapinum, undir aðrir uttanhýsis kostnaðir. Tøkugjaldið er ikki at meta sum ein framleiðslukostnaður og verður tí trekt frá í útrokningini.

Framleiðslukostnaðurin fyri kilo er samlaði framleiðslukostnaðurin / tøkan í kruvdari vekt.

Hetta roknistykkið verður gjørt fyri alipartin av alifyritøkunum í Føroyum. Eru tað alifyritøkur, sum eisini hava annað virksemi, t.d. fóðurframleiðslu, fiskavirking á landi, o.s.fr., skal hetta ikki takast við, tá framleiðslukostnaðurin verður útroknaður. Tað eru einans roknskapartølini frá sjálvum alivirkseminum, sum verða nýtt í hesum høpi. Hesi eru at finna í ársroknskapunum hjá føroysku alifyritøkunum.

Alifyritøkur tilsamans	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**
Framleiðslukostnaður u. starvsfólk og tøkugjald	1.953.073	1.996.778	1.994.379	2.384.152	2.267.735	3.102.783
Starvsfólkakostnaður	76.463	91.717	103.739	118.999	137.397	166.667
Avskrivingar	139.874	199.409	242.320	336.492	368.693	442.518
Framleiðslukostnaður tilsamans	2.169.410	2.287.904	2.340.438	2.839.643	2.773.825	3.711.968
Tøka, kruvd vekt	68.271	71.172	64.732	77.863	72.918	94.823
Samlaður kostnaður/kg.	**31,78**	**32,15**	**36,16**	**36,47**	**38,04**	**39,15**

Uppskotið broytir lógina soleiðis, at alifyritøkurnar skulu gjalda lutfalsliga meira, tá laksaprísirnir eru høgir.

Avgjaldsgrundarlagið er tann nøgdin, alifelagið hevur slaktað ein ávísan mánað, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Tøkugjaldið verður funnið við, at avgjaldsgrundarlagið verður faldað við viðkomandi prosentsatsi, ið er stigvíst hækkandi, alt eftir hvør miðal altjóða marknaðarprísurin er.

Gamla skipanin - galdandi lóg
Er prísurin 36 kr. kilo ella hægri, er gjaldið 5%.
Er prísurin millum 32 kr. og 36 kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
Er prísurin lægri enn 32 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Nýggja skipanin - lógaruppskotið
Er prísurin meir enn 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 10%.
Er prísurin millum 15 og 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 7,5%.
Er prísurin millum 5 og 15 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 5,0%.
Er prísurin hin sami sum ella 5 kr. hægri enn framleiðslukostnaður, er gjaldið 2,5%.
Er prísurin lægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 0,5%.

Í § 2, stk. 7 í løgtingslógini um loyvisgjald á alivinnu er ásett, at tøkugjaldið fellur til gjaldingar í 4 gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Lógarbroytingin ger, at fjórða árliga gjaldið skal fella til gjaldingar 1. november heldur enn 1. oktober.

Longu tá lógin varð samtykt á fyrsta sinni, var ætlanin, at gjaldingin av tøkugjaldinum skuldi gerast pr. ársfjórðing eins og við meirvirðisgjaldinum, t.e. at fjórða gjaldið skuldi fella til gjaldingar 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum.

Til § 2
Eftir uppskotinum skal lógin fáa gildi 1. juli 2023.

Á Løgtingi, 7. mars 2023

Bárður á Steig Nielsen	Eyðdis Hartmann Niclasen	Magnus Rasmussen
Erhard Joensen	Helgi Abrahamsen	Johan Dahl
	Kaj Leo Holm Johannesen	

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Útrokningar av tøkugjaldi o.a.